

Savnsmynd

# Vil gera gamlar boripallar til seym

**Jógvan Hugo Gardar**

21.03.2015 - 16:57

Oljan.fo

Síðani oljuprísurin fór at lække í summar, so eru fleiri boripallar tiknir úr framleiðslu, og lagdir. Bíða vervur eftir betri tíðum, og hjá fleiri feløgum verður bíðitíðin brúkt til at gera viðlíkahald, og at nútímansgera teir.

Tað heldur stjórin i Seadrill, John Roche, er óneyðugt. Á ráðstevnu hjá Swedbank i vikuni, segði hann, saambært Finansavisen, at nú prisurin fyri at leiga boripallar eru lækkaðir so nógv, so burdu eigararnir heldur hugsa um at senda teir gomlu pallarnar til upphøggingar, og gera teir um til seym. Tað er ein betri loysn, heldur Roche, heldur enn at brúka stóra upphæddir til at halda teir viðlíka og nutímansgera teir.